# ítróttur

Nr. 39 • fríggjadagur • 25. februar 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo



*Gongur tað sum FSF ætlar, so verður tað møguleiki fyri at síggja Atla Danielsen og aðrar føroyskar 1. deildarspælarar beinleiðis í sjónvarpi í næstum.* *savnsmynd*

# Feløgini bíða við sjónvarpsrættindunum

**Fótbóltssambandið hevur sent feløgunum kring landið eitt skriv, har tey verða biðin um at lata sjónvarpsrættindini til heimadystirnar til FSF, men feløgini vilja ikki skriva undir**

SJÓNVARPSRÆTTINDI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Herfyri fingu fótbóltsfeløgini kring landið eitt skriv frá FSF, har heitt var á feløgini um at geva sjónvarpsrættindini til dystirnar hjá sínum liðum frá sær til FSF, sum tykist hava ætlanir um at sjónvarpa dystir.

## Vilja hava meiri kunning

Skrivið, ið feløgini hava fingið, er sett upp sum eitt skjal, ið feløgini undirskriva, og síðani skulu tey senda tað aftur til FSF, sum harvið hevur fingið sjónvarpsrættindini frá feløgunum. Hetta skriv skal verða fótbóltssambandinum í hendi í seinasta lagi 1. mars.

Men feløgini vilja ikki uttan víðari skriva undir upp á skjalið, tí tey meta, at tey vita alt ov lítið um, hvat loyvini innbera.

Formenninir í øllum 1. deildarfeløgunum kring landið hava tosað saman, og teir hava í fleag avgjørt, at eingin teirra skrivar undir skjalið, fyrr enn teir hava fingið meiri kunning frá Fótbóltssambandinum um, hvat fylgir við loyvinum.

Birgir Enghamar, formaður í HB, sigur, at tað er ikki tí, at feløgini vilja seta fót fyri nakrari nýhugsan innan fótbóltin, men tey halda seg bara hava fingið alt ov lítla kunning um, hvat ið tað er, sum tey lata frá sær, tá ið skjølini verða undirskrivað.

– Eg haldi, at tað rættasta hevði verið, at feløgini mannaðu ein bólk við trimum limum, ið allir eru formenn í onkrum av 1. deildarfeløgunum, og so kann hesin bólkurin taka upp samráðingar við FSF um sjónvarpsrættindini, sigur Birgir Enghamar.

## Til gagns fyri feløgini

Í Fótbóltssambandinum eru tey vitandi um, at feløgini ivast í sjónvarpsrættindunum. Aðalskrivarin í FSF, Ísak Mikladal, sigur, at kunnað er um málið á fundi við formenninar í feløgunum í juli 2004, á fundinum við feløgini í november 2004 og at formaðurin í Fótbóltssambandinum hevði hetta mál við í formansfrágreiðingini til aðalfundin í februar í ár.

– Sum málið stendur í løtuni, so fara vit sum skjótast at hava ein fund við formenninar í feløgunum. Tað snýr seg heilt einfalt um, at Fótbóltssambandið fær rættindini frá feløgunum til dystirnar í 1. deild, so at vit vegna feløgini og til gagns fyri tey kunnu samráðast við onkran sjónvarpsveitara, sum er áhugaður í møguligani at senda beinleiðis frá dystum í heimligu kappingini, sigur Ísak Mikladal.

Tað man neyvan verða tann stóri áhugin millum útlendskar sjónvarpsveitarar at keypa rættindini til føroysku kappingina, men hesi rættindi kunnu møguliga seljast í einum pakka saman við rættindunum til landsdystirnar hjá føroyska A-landsliðnum, og hesir dystir eru í løtuni væl meiri áhugaverdir sum søluvøra, greiðir Ísak Mikladal frá.

Aðalskrivarin í FSF sigur, at eftir hansara tykki má tað verða áhugavert fyri feløgini, at FSF ger eina roynd at selja rættindini til 1. deild í Føroyum, so at tað eisini gerst meiri áhugavert fyri lýsarar at lýsa á búnunum hjá liðum og á skeltum kring vallirnar.


**Glasísetari/ montørur**

**FTV Glas søkir fólk at montera rútar.**

***Førleiki***
Vit vænta, at tann ið settur verður
- er útbúgvin timburmaður/snikkari ella hevur aðrar viðkomandi royndir á økinum
- hevur góð samstarvsevni
- hevur koyrikort

***Starvið***
Tú kemur at koyra út til kundar at seta rútar í, umframt at gera aðrar glasmonteringar

***Vit bjóða***
- eitt áhugavert og avbjóðandi starv í einum fakið sum er í menning
- góðar arbeiðsumstøður
- løn eftir avtalu

Umsókn við avriti av prógvum og ummælum skulu sendast til:

FTV Glas
Sundsvegur 8
FO-100 Tórshavn
Mrk. umsókn
**ftvglas@ftvglas.fo**

FTV GLAS
FØROYA TERMOVIRKI

TEAM85



**Sertúrar 2005**

WWW.SMYRIL-LINE.COM

**Norröna verður í komandi mánaðum karmur um fleiri áhugaverd tiltøk. Her verður undirhald á høgum »altjóða« stigi og livandi tónleikur við dansi, spæli, aktivitetum, sangi og øðrum.**

**Páskatúrur**
17.–21. mars & 24. –28. mars

Á skránni verður tónleikur á høgum støði. Undirhald og skemt verður fyri børnini við m.ø. Hannibal og Angelu. Eisini verður skipað fyri páskatiltaki, har børnini sleppa at gera páskaprýði. Um kvøldið verður undirhald við Sølvu, Ronnie og vinfólkum.

**Bingotúrur**
7.–11. apríl

Talan verður um eitt SUPER-BINGO tiltak, har nógvir góðir vinningar verða lutaðir út, eitt nú ferð við Norrönu í luksuskamari, hotelluppihald, matur og annað áhugavert.

**Ungdómstúrur**
14. –18. apríl

Enn eitt RISA-UNGDÓMSTILTAK fer nú av bakkastokki miðan apríl, har eitt nú DJ-Martin Kjærbo skal venda plátum, meðan væl umtókti bólkurin All That Rain – nr. 2 í Prix Føroyar kappingini 3 ár á rað – spælir til dans. Óivað verður hetta enn ein hendingar- og minnirík ferð við øllum tí, ið hoyrir til eina slíka ferð – hvør minnist ikki seinastu ungdómsferð? So latið ikki hini greiða frá, hvat hendi umborð, komið við sjálvi og sigið frá hesum – tí tað verður MEGA COOL!

**Gospeltúrur**
21.–25. apríl

Á fyrsta sinni verður skipað fyri einum gospeltúri umborð á Norrönu. Her verður føði fyri bæði likam og sál. Luttakandi tónleikarnir og undirhaldarnir umboða tað besta, vit eiga innan føroyskan gospeltónleik og spenna sera vítt, bæði í tíð og stíli. Í tiltakinum "Syngið við" verður høvi hjá øllum at taka undir við sanginum. Børnini verða ikki gloymd, tí barnaundirhald verður við gyklaranum Ásbjørn Bertelsen. Luttakarar: Magni Christiansen, United Voices, Sigrid Sivertsen Band, gospelbólkur úr Lívdini við m.ø. Onnu Háberg og Kingo-bólkurin úr Tjørnuvík

**Gourmettúrur**
5.–9. mai

Felagið "kræsnir gómar" skipar fyri 3 kvøldum við ávikavist sponskum, fronskum og italienskum gourmet-mati og forkunnugum árgangsvíni til. Somuleiðis verður høvi at royna whiskey, cognac og vínsmakking, síggja mótaframsýning, taka lut í krem og smyrsl skeiðum og dansa til tann ljósa morgun – ella bara slappa av og njóta at kunna koma til búgvið borð.

**Countrytúrur**
12.–16. mai

Á hesum túri verða kend sum ókend country-løg at hoyra og vælumtóktir føroyskir bólkar og einstaklingar taka lut. M.a. kunnu nevnast Nicolina á Kamarinum og Karl Martin Samuelsen. Skipað verður fyri Karaokee tiltaki, rodeo-ríðing og work-shop í "line-dance" við Hjørring-Hirtshals Country Show Dance. Harumframt verður høvi at keypa veruliga cowboy-útgerð sum leðurstylvar, cowboy-hatt o.a. í western-shoppini. Hilmar Jan og Petur Rouch, sum vit kenna frá Rót og Rytmu, verða við. Fyriskiparar verða Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen

**Bingotúrur**
30. mai–1. juni & 8.–10. august

Enn ein SUPER BINGO túrur fyri øll áhugað, har góðir vinningar sum ferð við Norrönu í luksuskamari, hotelluppihald, matur og nógv annað áhugavert verður lutað út.

**Harmonikutúrur**
29.–31. august

Vælumtókti harmonikutúrurin verður aftur á skránni í ár. Hesin er fyri øll, ið dáma harmonikutónleik og at dansa til langt út á náttina. Sum vanligt luttaka fleiri góð og kend føroysk harmonikulið á túrinum. Fyriskiparar verða Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen

**J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370**
**FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00**
**Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo**

SMYRIL LINE

***Droym tað ikki – royn tað!***